FÆRØSK

KØBENHAVNS KOMMUNE



# Røktarheim fyri øll

Hvussu er lívið á røktarheiminum á Peder Lykke deplinum?

PEDER LYKKE CENTRET
Vi rummer en verden af liv

# Vælkomin til Peder Lykke depilin — Her er pláss fyri øllum

Peder Lykke depilin er fyrsta margfeldisrøktarheim í Danmark, har íbúgvar úr umleið 20 londum búgva.
Á Peder Lykke depulin leggur seg eftir at hýsa einum lívligum heimi við teimum ymisleikum og møguleikumið eru, tá ið íbúgvar og starvsfólk úr øllum heiminum savnast undir somu lon.

Á Peder Lykke deplinum virða vit margfaldu livihættirnar hjá teimum ymsu íbúgvunum og vit meta teirra ymiska mentanarliga uppruna og søgu sum eina styrki. Vit veita tryggar karmar og góðar upplivingar í gerandisdegnum við júst at stuðla tí, sum gevur tí einstaka menniskjanum lívsgóðsku - viðvíkjandi átrúnaði, áhugamálum, siðvenjum og matsiðum. Starvsfólkið sær íbúgvarnar sum serstøk menniskju.

Starvsfólkini koma sjálvi úr fleiri enn 20 londum, og teirra málsligu og mentanarligu førleikar gera sítt til at skapa eitt rúmligt og fjølbroytt røktarheim, har rúm er fyri øllum.



Starvsfólkini á staðnum tosa fleiri enn 15 mál og koma úr fleiri enn 20 londum.



**Felagsmentanarhølið**
Felagsmentanarliga hølið er útgjørt við ljósi og útgerð, so at vit kunnu broyta hølið til eina mosku, kirkju, eitt stað úti í náttúruni ella okkurt heilt annað.
Endamálið er at nøkta ymisku áhugamálini hjá íbúgvunum.
Hølið er tí tøkt hjá øllum íbúgvum til tiltøk, sum teir sjálvir taka stig til, eins og tiltøk, sum starvsfólk leggja til rættis.
Um onkur heldur vil liva eftir síni trúgv, meditera ella bara njóta friðin einsamøll/-mallur, hava vit eisini eitt kvirrurúm.

# "Mær dámar sera væl, at vit eru so nógvir ymiskir íbúgvar á Peder Lykke deplinum, at vit búgva saman, men eisini at vit kunnu fara hvør til sítt.

# Spurningar og svar

**Búgva íbúgvar úr nógvum ymiskum londum á Peder Lykke deplinum?**
Á Peder Lykke deplinum búgva íbúgvar úr umleið 20 londum, men meginparturin av íbúgvunum eru upprunaliga úr Danmark. Á røktarheiminum býrt tú hurð um hurð við íbúgvar, sum tosa ymisk mál og hava ymiskan etniskar og mentanarligan uppruna. Her eru daghaskúli og virksemisdepil, har fólk úr øllum heiminum eisini eru.

**Hvussu búgvi eg á margfeldisrøktarheiminum?**
Tú kanst skipa títt egna búøki, sum tú sjálv/ur vilt. Tú gert sjálv/ur av, hvat innbúgv tú vilt hava, nær tú vilt hava vitjan, og hvør kann vitja. Tú fært egna stovu, baðirúm og vesi. Vit hava eisini felagshøli, sum tú ert vælkomin at nýta. Her kanst tú brúka tíðina við hinum íbúgvunum, tíni familju og tínum vinum.
Røktarheimið hevur altíð eitt útbúgvið fólk tøkt, sum kann hjálpa tær við tí røkt og umsorgan, sum tær tørvar. Um tú vilt velja hvat kyn skal standa fyri tínum røktaruppgávum, so taka vit hædd fyri tí.

**Hvønn mat fái eg?**
Vit leggja dent á, at øll skulu kunna eta matin, vit gera, og øll kunnu hava ávirkan á tað, sum vit borðreiða við. Tú kanst altíð spyrja, hvørjar rávørur vit brúka og hvussu vit gera matin til í køkinum. Okkara køksfólk eru útbúgvin til at gera mat eftir ymiskum tørvi.
Hvønn mánaða ger køkurin eina matarætlan fyri komandi mánaðin, har ein halal-rættur er við hvørja ferð.
Starvsfólkið vil fegið frætta, um tú hevur ítøkilig ynski um matin, ið verður borðreiddur.



**Sleppi eg framvegis at hitta familjuna og vinir mínar eins nógv, tá ið eg flyti á margfeldisrøktarheim?**
Tá íð tú býrt á Peder Lykke deplinum, fært tú títt egna búøki, har tú kanst fáa so nógva vitjan, sum tú sjálv/ur vilt. Nógv avvarðandi kenna í roynd og veru, at tey hava betri tíð at vera saman sum familja, tá ið eitt starvsfólk er, sum kann taka sær av føstu røktaruppgávunum. Sum íbúgvi hevur tú altíð menniskju kring teg, og fært møguleika at luttaka í ymiskum virksemi hvønn dag. Peder Lykke depilin skipar eisini fyri fleiri veitslum ígjøgnum árið fyri at halda heimsins hátíðir, og tá eru avvarðandi og vinir hjartaliga vælkomin at luttaka.

**Hvør ræður fyri mær á margfeldisrøktarheiminum?**
Tú ið tú flytur inn, býrt tú í tínum egna búøki, sum tú sjálv/ur kanst innrætta. Tú gert eisini sjálv/ur av, hvussu nógvum virksemi tú luttekur í, hvørjum átrúnaði tú livir eftir, og hvat tú etur. Vit leggja stóran dent á at lurta eftir tær og tínum avvarðandi og gera alt, vit megna, fyri at tú kanst liva títt lív, sum tú altíð hevur og vilt.

**Halda tit aðrar hátíðir enn tær donsku?**
Vit læra alsamt meiri um siðir frá heiminum kring okkum.
Vit hava millum annað hildið kinverskt nýggjár, filipinsk jól, Newroz og Eid.
Harumframt hava vit á hvørjum ári eina margfeldisveitslu, har ymisk lond og hátíðir verða sýnd fram í tjøldum í urtagarðinum, eitt nú við tónleiki og mati.
Vit eru forvitin um nýggjar siðir og leggja okkum javnan eftir at umboða ymiska upprunan hjá íbúgvunum, í sambandi við tiltøkini, sum vit skipa fyri. Vit vilja fegin hoyra frá tær, um tú vilt, at vit hava okkurt tiltak.

**Verður nakað starvsfólk, sum dugir mítt mál?**
Tú fært tað starvsfólkið, ið fakliga megnar best at hjálpa tær við tínum tørvi fyri røkt og umsorgan. Vit kunnu ikki tryggja tær, at vit altíð hava eitt starvsfólk, ið tosar títt mál, men av tí at 15 mál eru millum okkara starvsfólk, fer mangan at bera til at tosa við eitt starvsfólk, ið tosar sama mál sum tú.

**Kann eg liva eftir mínum átrúnaði?**
Ja, allir átrúnaðir eru vælkomnir á Peder Lykke deplinum. Øll fáa høvi at liva eftir sínum átrúnaði, antin í privata búøkinum, í felagsmentanarliga hølinum ella í kvirrurúminum, sum er gjørt til endamálið. Vit leggja okkum haraftrat eftir at halda hátíðir frá ymiskum átrúnaðum og mentanum í felag.



Við bæði virksemisdepli, dag-háskúla, røktarheimi, innkeypsmøguleikum, kafé og nógvum øðrum undir somu lon, ber til at gera øll dagligu ørindini á deplinum.

# Á Peder Lykke deplinum eru mangir ymiskir møguleikar at takast við síni áhugamál.

**Hvussu nógv kostar at búgva á margfeldisrøktarheiminum?**
Tú mást rinda fyri tínar útreiðslur, júst sum í øllum privatum bústøðum. Tað snýr seg t.d. um innskot, húsaleigu, streym, hita, sjónvarp, telefonhald og mat. Húsaleigan verður ásett eftir tíni inntøku.

**Hvussu fái eg pláss á margfeldisrøktarheiminum?**
Fyri at koma á røktarheim skal kommunan visitera teg. Tú kanst ringja og biðja um fund við visitasjónina á **tlf 33 66 33 66**. Tey meta um tú ert skikkað/ur til pláss. Metingin er grundað á reglur og tænastustøði hjá kommununi, ið verður ásett av politikarunum. Tá ið visitasjónin er framd, kunnu tey greiða tær frá tínum møguleikum, og tá kanst tú siga, um tú vilt búgva á Peder Lykke deplinum. Tørvar tær hjálp til at fáa skil á heilsutilboðunum í tíni kommunu, kanst tú seta teg í samband við Peder Lykke Centrets Etniske Ressourceteam, har eitt starvsfólk kann hjálpa tær við visitasjónsfundinum.

Um tú ella tín familjahava spurningar, eru tit altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.



**Hvussu fái eg pláss á margfeldisrøktarheiminum?**

Fyri at koma á røktarheim skal kommunan visitera teg. Tú kanst ringja og biðja um fund við visitasjónina á tlf 33 66 33 66

# Samband

**Peder Lykke Centret**
Københavns Kommune

Peder Lykkes Vej 63-65
2300 København

Telefon 3234 4387

www.pederlykkecentret.dk

PEDER LYKKE CENTRET
Vi rummer en verden af liv